## DAGSINS MEINING

# Sjálvstýrisflokkurin og traðarspurningurin

Umboðið fyri kultur-radikalismuna á Føroya Løgtingi, tann hóvligi sjálvstýrisflokkurin, hevur lagt eitt uppskot um at geva monnum og kvinnum loyvi at keypa leigutraðir, sum tey hava í leigu frá Búnaðarstovuni.

Uppskotið er í tíðarinnar anda. Í hvussu er hjá teimum liberalu, og Sjálvstýrisflokkurin er ikki bara liberalur, men eftirhondini eisini bæði borgarligur og konservativur. Alt, sum alment er, skal einskiljast. Og tað eru eisini teir og tey, sum síggja ein vinning í at fáa einskilt fiskin á grunnunum - »ogn Føroya fólks«, sum staðfest verður í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Tá eitt slíkt uppskot verður lagt fyri Tingið, mugu fyrimunir og vansar setast upp, og avleiðingarnar kannast, hóast uppskotið ikki hevur tann stóra samfelagsliga týdningin. Afturímóti hevur ætlanin hjá Sjálvstýrisflokkin kanska týdning fyri tann einstaka og trivnaðin hjá honum. Og tað er nakað, vit altíð mugu seta í fremstu røð.

Nú er tað so, at hundraðtals traðir eru seldar teimum gomlu leigulendingunum. Tá menn høvdu velt ávísan part, kundu teir fáa traðirnar til keyps, og keypsavtalan var stak lagalig. Óivað fyri at eggja monnum til at velta. Nógv keyptu traðir fyri 100 krónur, sum kundu gjaldast í 10 ár - 10 krónur um árið. Ikki minst í høvuðsstaðnum.

Traðirnar komu væl við hjá teimum fyrstu ættarliðunum. Tey høvdu kúgv og seinni seyð. Men sum fráleið minkaði týdningurin at hava kúgv, og tað er neyvan nankar traðarmaður, sum hevur kúgv í dag. Á teimum traðunum, sum enn eru til leigu, man seyður og okkurt gásapar ganga í dag. Men vit hava framvegis eina traðarmentan.

Sum bygdir og býir vuksu - serliga Havnin - var trot á byggilendi. Tær nógvu traðirnar eru tí útstykkjaðar til sethús, vegir, virkis- og handilsbygningar. Og mangur traðarmaður hevur fingið millióna upphædd fyri ta jørð, sum abbin ella langabbin við stríði og strevi velti upp úr nýggjum. Tvær tríggjar milliónir er ikki óhoyrt, og onkur er farin fyri einar 10 milliónir.

V. ø. o. hevur tað borið til at spekulera í jørð. Er tað heppið? Onkur heldur, at tað er í fínasta lagi, men hetta er neyvan gagnligt fyri búskapin. Og hví skal vera neyðugt at selja? Ein, sum hevur hug at fáast við jørð og hava nakrar seyðir og eina veltu, er líka glaður, um hann eigur jørðina ella um hann leigar hana.

Summi halda, at eitt tað ringasta, sum er hent í Føroyum við atliti til jørðina, er, at menn fingu loyvi at keypa jørð ella traðir. Tað hevur elvt til óhugnaliga spekulatión og til arvaklandur í nógvum familjum. Var talan um leigujørð, so vóru vit sloppin undan hesum neiligu avleiðingunum. Tí man tað neyvan verða rætt at selja leigutraðir, men heldur broyta lógina, so tey, sum missa jørðina aftur til festið eftir eini broyting í 80-unum, kunnu halda fram at hava hana.

Annars er eitt sindur tragikomiskt, at Sjálvstýrisflokkurin mælir til at selja leigutraðir. Fór ikki sami flokkurin í tvíningar á sinni, tí smámaðurin í Føroyum skuldi kunna fá traðir til leigu burtur av kongsjørðini???

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Slíkt eru menn!!!

**Áki Andreassen**



Bjarni Djurholm, oljumálaráðharri og varaløgmaður sigur við Portalin, at um føroyingar finna olju og fara at svimja í pengum, so fara vit kanska at fáa sjálvstýri. Tað er nú ein avdúking av teimum áhugaverdu, at varaløgmaður heldur, at pengarnir keypa okkum frælsi!

**Sambandsmaður – so leingi eingir oljupengar eru..!!**
Tað vil siga: Varaløgmaður er sambandsmaður, so leingi hann heldur seg hava brúk fyri pengum úr Danmark, men sjálvstýrismaður, um danski statskassin kann skiftast út við oljupengar.

Nú veit eg væl, at nógv hava hesar tankar. Men at landsins leiðandi menn alment traðka fram og gera spurningin um at ráða í egnum landi til ein spurning um peningaligt kremmarí, tað taki eg sterka frástøðu frá. Eg kundi hugsað mær at fingið at vita, hvat hinir sambandsmennirnir í Fólkaflokkinum halda um hetta - eru teir samdir??

**Eingin moralur – bert mammon!!!**
Eg haldi tað er beinleiðis vamlisligt, at ongin moralur og ongin virði eru aftan fyri politisku avgerðirnar. Við sovorðnum politikki fáa vit eitt sjálvsøkið og órættvíst samfelag, har tær stóru avgerðirnar verða tiknar av tilvild og opportunismu - eisini um oljupengar vera í Føroyum.

Hesar útsøgnir frá varaløgmanni kunnu bara skapa vanvirðing fyri føroyingum í brøðratjóðini Danmark og millum møguligar samstarvsfelagar hjá Føroyum.

Eg eri tjóðveldismaður, tí eg vil hava ávirkan á mítt egna samfelag og taka ábyrgd av framtíðini. Tí vil eg heldur ikki hava politikarar, ið bara lata seg stýra av kreftum, sum vit onga ávirkan hava á.

Við hugburðinum hjá Bjarna Djurholm kunnu vit akkurát tað sama seta ein veðurhana á mønuna á Tinganesi og lata hann gera av, hvønn veg vit skulu fara.

**Hvørjar eru fyrireikingarnar??**
Og eitt afturat: Bjarni Djurholm tosar um, at vit skulu fyrireika okkum til at umsita møguligar oljupengar og aðrar avleiðingar. Hví er onki gjørt við hetta, og hví hevur Fólkaflokkurin forðað fyri, at ein búskapargrunnur verður settur á stovn?? So vit kunnu bert spyrja, hvørjar fyrireikingarnar eru, kunnu vit kanska fingið okkurt at vita um tað??

# Tjóðveldisfólk vilja ávirka

**Undir heitinum »Kom og ávirka« er Tjóðveldisflokkurin farin undir tiltak at fáa fleiri fólk at taka lut í politikki**

POLITIKKUR

– Tjóðveldisflokkurin roynir at ganga nýggjar leiðir í royndini at fáa fleiri fólk at taka lut í politikki. Hevur tú hug at taka lut í politiskum arbeiði og at fáa ávirkan? Hevur tú hug at taka lut í skeiðum í politiskum arbeiði og í almennari framløgu? So ert tú vælkomin at taka lut í evnisdøgum Tjóðveldisfloksins, sum verða hildnir kring landið, sigur Tjóðveldisflokkurin í tíðindaskrivi.

Undir heitinum **»Kom og ávirka«** er Tjóðveldisflokkurin farin undir eitt nýtt tiltak til tess at fáa fleiri fólk at taka lut í politiskum arbeiði.

Flokkurin ehvur lagt eina ætlan fyri evnisdagar, har stevnumið floksins verða gjøgnumgingin og endurskoðað - og har fakfólk leggja fram um viðkomandi tættir í samfelagnum. Eisini verður skeið í framløgu fyri fólk, ið hava hug at bjóða seg fram í politikki.

Fyrsti av hesum evnisdøgum var í Sandavági leygardagin 3. september - dagurin var sera væleydnaður, og nógv kom burturúr.

Leygardagin 1. oktober verður annar av hesum evnisdøgum á Klaksvíkar Sjómansskúla. Evnini, sum verða viðgjørd, eru úr stevnumiðum floksins:

- **Einar skapandi Føroyar**
  mentamál og list, barna- og ungdómspolitikkur, eldrapolitikkur
- **Einar javnari Føroyar**
  almanna- og heilsumál, arbeiðsmarknaður, pensiónsskipan, íbúðarmál

**Skrá fyri dagin**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 | Framsøgufólk Tjóðveldisfloksins greiðir frá verandi stevnumiðum floksins.<br>Annita á Fríðriksmørk: Einar skapandi Føroyar.<br>Finnur Helmsdal: Einar javnari Føroyar. |
| Kl. 10.45 | Jancy B. Klein umrøður: Almanna- og heilsumál, arbeiðsmarknað, pensións-skipan, íbúðarmál. |
| Kl. 11.00 | Edward Fuglø umrøður: Mentamál og list.<br>Gestur Hovgaard umrøður: Barna-, ungdóms- og eldrapolitikk. |
| Kl. 11.30 | Kjak. |
| Kl. 12.00 | Døgurðasteðgur. Arbeiðsbólkar verða skipaðir. |
| Kl. 13.00 | Kjak - framhald. |
| Kl. 14.00 | Bólkaarbeiði. |
| Kl. 15.00 | Arbeiðsbólkar leggja fram uppskot til broytingar í stevnumiðum floksins. |
| Kl. 16.00 | Evnisdagurin endar. Starvsnevndin tekur samanum evnisdagin. Tíðindaskriv verður orðað og sent fjølmiðlunum. |
| Kl. 16.30 | Starvsnevndin og nevndin í økisfelagnum møtast til fundar. |
| Kl. 18.00 | Alment tjóðveldistiltak - (hugnaløta). |
| Kl. 20.30 | Liðugt. |


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.